# Motorsúkklur skulu gerast bíligari

**Tað heldur í øllum førum Kári P. Højgaard, tingmaður Sjálvstýrisfloksins, sum hevur lagt fram uppskot á ting um at lækka skrásetingargjaldið fyri nýggjar motorsúkklur úr 125% niður í 50%**



*Kári P. Højgaard heldur, at nýggjar motorsúkklur eru ov dýrar. Hann mælir til, at skrásetingargjaldið minkar úr 125% til 50%*

MOTORSÚKKLUR
*Eirikur Lindenskov*

Tað kann ikki verða rætt, at 90% av innfluttu motorsúkklunum eru brúktar, meðan tilsvarandi talið av innfluttum brúktum bilum er 11%. Hetta staðfestir, at verandi avgjaldsskipan ger, at nærum ongar nýggjar súkklur verða keyptar, sigur Kári P. Højgaard, uppskotsstillari.

Hann sigur, at líknandi uppskot varð lagt fyri løgtingið seinasta ár, og varð hetta av flestu framsøgumonnum við 1. viðgerð jaliga móttikið. Uppskotið datt burtur, tí at nýval bleiv útskrivað í desember 2003.

Ídag hava nýggjar súklur eitt skrásetingargjald uppá 125%, men er súklan 5 ár ella eldri er gjaldið 50%. Eftir hesum uppskoti verða nýggjar og eldri súklur javnsettar og gjalda 50%, sigur hann.

Løgtingsmaðurin vísir á innflutningstøl fyri bilar og motorsúkklur (skrásett pr. 27.09.04). Har sæst, at innfluttir vórðu 153 brúktir bilar og 838 nýggir. Í sama tíðarskeiði komu 98 brúktar og 6 nýggjar motorsúklur til landið. Yvir eitt fýra ára skeið er talan um, at 90% av motorsúklunum, ið verða innfluttar, eru brúktar, meðan talið á gomlum bilum er 11%.

Kári P. Højgaard heldur, at tað er til frama fyri umhvørvið og trygdina á vegum okkara, um fólk heldur keyptu nýggjari akfør.

Tað er neyvan nakar ivi um, at ein nýggj súkla er tryggari enn ein gomul ð og ábøtur henda alla tíðina á tekniska økinum, ið gera akførini betri og tryggari - eisini motorsúklur, sigur Kári P. Højgaard - og leggur afturat, at uppskotið helst fer at geva landskassanum økta inntøku.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi, um kvøldið upp í ein strúk. Sólglottar, men eisini okkurt ælið, partvis heglingur. Hitin milum 4 og 7 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Um kvøldið lækkar hann niður í sunnan og regn. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri og yvirhøvur turt, men támut veður. Hitin millum 6 og 9 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og suðri, týskvøldið upp í skrið. Stundum regn ella ælingur, mánakvøldið møguliga vátaslettingur. Hitin millum 3 og 7 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -10 |
| Nuuk | -7 |
| Qaqortoq | -5 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 3 |
| Seyðisfjørður | 6 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 8 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 9 |
| Tromsø | 1 |
| Bergen | 5 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 5 |
| Keypmannah. | 7 |
| Helsinki | -2 |
| Moskva | 1 |
| Berlin | 5 |
| Warzawa | 5 |
| Kiev | 3 |
| Bukarest | 2 |
| Paris | 2 |
| Madrid | 10 |
| Róm | 13 |
| Malorca | 17 |
| Athen | 13 |
| Malta | 18 |
| Tunis | 21 |
| Beijing | 11 |
| New Dehli | 20 |
| Bangkok | 29 |
| Jakarta | 34 |
| Sydney | -- |
| New York | 14 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 12 |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | -- |
| La Paz | -- |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 24 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 991 hPa. vestan fyri Skotland fer í landnyrðing norðan og hitabrúgvin við Føroyar fer norðureftir. Kuldabrúgvin fer um Føroyar seint hóskvøldið.




**Í dag:**
Lágtrýstið vestan fyri Ísland stendur mestsum í stað. Kuldabrúgvin eystan fyri Føroyar fer eystureftir og hevur nakað kaldari luft við sær.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 08/12 kl. 06⁰⁰–09/12. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 9,1°
Minsti hiti máldur í des.: ÷10,5° - Mesti hiti máldur í des.: 13,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 3,0 mm – mált frá 08/12 kl. 06⁰⁰–09/12 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í desember: 65,7 mm

## Morgunlestrar
**13.– 18. desemb.**

***Eli Jensen á Hellunum, lesur***
**Sálmar:**

**Mánadagin 13. desember:**
nr. 79 Eitt navn á fold av øllum ber
nr. 80 Lat títt dýrabara navn

**Týsdagin 14. desember:**
nr. 85 Ver glað nú, brúður Krists

**Mikudagin 15. desember:**
nr. 88 Statt upp úr svøvni, tú ið svevur
nr. 90 Upp, gleðist allir, gleðist nú

**Hósdagin 16. desember:**
nr. 62 Tú, Harri Krist

**Fríggjadagin 17. desember:**
nr. 60 Hjá tær, mín Harri Guð
nr. 61 Í Harrans hondum eri eg

**Leygardagin 18. desember:**
nr. 74 Góði Jesus, Harri mildi
nr. 66 Set alla gerð í Jesu navni á


I EINUM SAMFELAG
HAR TEY VEIKASTU
HAVA TAÐ GOTT,
HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI


## VESTFALLSKYRRINDI

11. desember: Mánin næstur jørðini
12. desember: Tendring

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 9. des | 03.43 | 16.05 | 02.43 | 15.05 | 02.58 | 15.20 | 05.43 | 18.05 | 06.43 | 19.05 | 01.58 | 14.20 | 00.58 | 13.20 | 03.58 | 16.20 | 04.58 | 17.20 | 03.28 | 15.50 | 04.43 | 17.05 |
| 10. des | 04.29 | 16.54 | 03.29 | 15.54 | 03.44 | 16.09 | 06.29 | 18.54 | 07.29 | 19.54 | 02.44 | 15.09 | 01.44 | 14.09 | 04.44 | 17.09 | 05.44 | 18.09 | 04.14 | 16.39 | 05.29 | 17.54 |
| 11. des | 05.22 | 17.50 | 04.22 | 16.50 | 04.37 | 17.05 | 07.22 | 19.50 | 08.22 | 20.50 | 03.37 | 16.05 | 02.37 | 15.05 | 05.37 | 18.05 | 06.37 | 19.05 | 05.07 | 17.35 | 06.22 | 18.50 |
| 12. des | 06.21 | 18.52 | 05.21 | 17.52 | 05.36 | 18.07 | 08.21 | 20.52 | 09.21 | 21.52 | 04.36 | 17.07 | 03.36 | 16.07 | 06.36 | 19.07 | 07.36 | 20.07 | 06.06 | 18.37 | 07.21 | 19.52 |
| 13. des | 07.23 | 19.54 | 06.23 | 18.54 | 06.38 | 19.09 | 09.23 | 21.54 | 10.23 | 22.54 | 05.38 | 18.09 | 04.38 | 17.09 | 07.38 | 20.09 | 08.38 | 21.09 | 07.08 | 19.39 | 08.23 | 20.54 |

5 707265 100050 >